# Dygd og stílur í Eikini




**Eikin er handil, ið selur innbúgv, og umframt húsast Eikin í sera vøkrum umhvørvi í bygninginum yvir Sandá í Havn, sum upprunaliga var bygdur til spinnarí**

Eikin hevur alskyns møblar at selja. Bæði til privathús, skrivstovur, skúlar og stovnar. Og eisini er innbúgv í ymsum prísflokkum.

Men í Eikini eru tey trúgv mótvegis endamálsorðingini, sum tey høvdu, tá tey fóru undir virksemið; Felagsnevnarin fyri vøruúrvalið er dygd og stílur niður í minsta smálutin.

Eikin varð stovnað í 1998 av Birgit og Gunnar Breckmann og Tummas Jákup Høj og húsaðist fyrstu tíðina í lítlum hølum miðskeiðis á Argjum.

Endamálið var at bjóða føroyingum dygdarmøblar fyri rímuligan kostnað. Eftirspurningurin vaks skjótt og leitað var tí eftir rúmligari hølum.

Í 1999 varð virksemið flutt í sermerkta og hugnaliga "Spinnaríið" við Sandá. Tað munnu vera fá virki í Føroyum í dag, sum húsast í so náttúruvøkrum umhvørvi sum Eikin.

Bygningurin og áin sameinast í hesum umhvørvinum, og er henda náttúruperlan karmur um Eikina, har fólk kunnu hyggja seg um eftir vøruúrvalinum, og samstundis njóta náttúruna og Sandá.

Bygningurin, sum nú hýsir møblasøluni, var upprunaliga bygdur til spinnarí. Harav navnið "Spinnaríið"

Vøruúrvalið er vorðið fjølbroyttari og í dag selur Eikin eittnú madrassur, klædnaskáp, baðirúmsmøblar og ikki at gloyma vælumtóktu køkarnar.

Handilin umboðar tað stílfullu og traditionellu klassisku linjuna eins væl og tey meira nútímans sniðini.

# Trygd er elsta tryggingarfelag í landinum

**TRYGD varð stovnað í 1932, og er harvið elsta tryggingarfelag í landinum**

Størsta partin av tíðini síðani stovnanina hevur Trygd tó ikki kunnað selt tryggingar, tí frá 1940 til 1997 – í 57 ár - var einkarrættur á føroyska tryggingarmarknaðinum.

TRYGD fekk ikki lut í hesum einkarrætti, sum tó loksins varð tikin av 1. januar 1997.

Føroya Banki setti tá nýggjan pening í felagið, og 2. februar 1998 fór TRYGD aftur undir at selja tryggingar.

Frá byrjan bjóðaði TRYGD familju- og sethúsatryggingar.

Á sumri í 1998 kom TRYGD við eini nýggjari og bíligari ferðatrygging, og í 1999 varð tryggingarútboðið víðkað til eisini at fevna um biltryggingar og tryggingar til vinnuna.

Við ársbyrjan í 2000 fór TRYGD undir at bjóða fram ískoytistrygging til biltryggingina, og við árslok 2000 varð eisini farið undir at tekna sjóvátryggingar. Við ársenda 2008 var tó hildið upp at við at teknað sjóvátryggingar fyri størru skipini.

Í 2001 fór TRYGD undir at tekna tryggingar til smábátar og eisini fyri flutning.

Trygd byrjaði í 2005 at tekna arbeiðsskaðatryggingar, og í 2006 varð farið undir at selja privatar vanlukkutryggingar.

Í 2006 kom Trygd á marknaðin við eini nýggjari sjúkratrygging nevnd Viðgerðartrygd.

Í dag teknar Trygd sostatt flest allar skaðatryggingar innan bæði privat-, og vinnuøkini.




**Kampingvognur**

**til leigu á kampingøkinum á Selatrað**

**Tlf. 218195**